Mars 2012

# Føroyskt bátasmíð



## Álit um at skapa føroyskum bátasmíði livilíkindi

MENTAMÁLARÁÐIÐ

**Innihald**


1. Til landsstýrismannin í mentamálum ........ 3
2. Tilmælið samanumtikið ........ 4
3. Grundarlag fyri álitinum ........ 5
4. Søguliga gongdin fram til tað nýggja samfelagið - yrkisumhvørvini ........ 6
5. Gongdin í 20. øld - avbjóðingar og avmarkingar ........ 7
6. Samleiki og mentanararvur ........ 8
7. Báturin á savn - báturin á livandi savn ........ 10
8. Livandi søvn í grannalondunum ........ 12
9. Umhvørvi á landi – nakrar ætlanir um livandi bátasavn ........ 14
10. Bátaumhvørvi í dag ........ 17
11. Bátasmíð og útbúgving ........ 21
12. Vinnu- og búskaparlig áhugamál ........ 25
13. Tilmæli ........ 29


*Á permuni: Bátasmíð á Eiði*
*Mynd: Føroya Fornminnissavn*


**Føroyskt bátasmíð**
Álit um at skapa føroyskum bátasmíði livilíkindi

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
FO-100 Tórshavn

tel +298 306500
www.mmr.fo

Mars 2012

## 1. Til landsstýrismannin í mentamálum

Tann 10. august 2011 setti Helena Dam á Neystabø, táverandi landsstýriskvinna í mentamálum, ein arbeiðsbólk at kanna umstøðurnar fyri at skapa bátasmíði livilíkindi í Føroyum.

Arbeiðssetningurin hjá bólkinum var at orða eitt álit við uppskotum um, hvussu siðbundið føroyskt bátasmíð kann verða varðveitt. Álitið skuldi meta um bátasmíð út frá

- musealum áhugamálum
- ítróttar- og frítíðar áhugamálum
- útbúgvingarligum áhugamálum
- vinnu- og búskaparligum áhugamálum
- øðrum

og hartil meta um kostnaðin av teimum tiltøkum, ið verða skotin upp.

Á fyrsta fundinum varð staðfest, at vitanin um føroyska bátin og føroyskt bátasmíð er varðveitt í skrivligum keldum og bókaverkum, men at tað livandi handverkið hevur truplar umstøður. Tað var eisini staðfest, at tað at varðveita gomul handverk, sum eru við at fara fyri bakka, ikki er ein serføroysk avbjóðing. Bæði í norðurlendskum og altjóða høpi verður arbeitt við hesum spurningum.

Tann føroyski báturin og bátasmíðið er ein dýrmætur partur av okkara mentanararvi, sum vit hava skyldu at varðveita til eftirkomarar okkara. Endamálið við hesum áliti er at koma við tilmæli um, hvørji tiltøk eiga at verða sett í verk fyri at skapa bátasmíði livilíkindi í Føroyum og harvið tryggja, at føroyskt bátasmíð verður varðveitt fyri eftirtíðina.

Tórshavn, 21. mars 2012

Olga Biskopstø
Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning

Rúna Hjelm
Felagið Grindabátarnir í Vági

Terji Reinert Jacobsen
bátasmiður

Jan Herman Hansen
Róðrarsamband Føroya

Regin Debess
savnslærari, Søvn Landsins

Oystein Sørensen
Yrkisdepilin

Erland Viberg Joensen, formaður í nevndini
Søvn Landsins

Armgarð Weihe, skrivari í nevndini
Mentamálaráðið

## 2. Tilmælið samanumtikið

Í álitinum verður staðfest, at skal føroyskum bátasmíði verða skapt livilíkindi, er neyðugt við átøkum, ið kunnu skapa neyðugar karmar og virkismøguleikar fyri varðveiting av siðbundna handverkinum.

Samanumtikið verður mælt til, at

- UNESCO-sáttmálin til verju av immateriella mentanararvinum verður settur í gildi fyri Føroyar
- karmar verða skaptir fyri skipan av livandi søvnum innan føroyska savnslóggávu
- Róðrarsamband Føroya í sínum regluverki tekur atlit at aðalreglunum í upprunasniðinum á føroyska bátinum
- játtan verður sett av á fíggjarlógini til frítíðarfeløg, ið eru um tann siðbundna føroyska bátin
- útbúgving í siðbundnum bátasmíði verður skipað sum yrkisútbúgving
- skeið í bátasmíði verða fyriskipað á tekniskum skúla í samstarvi við Søvn Landsins
- samstarv verður skipað millum skúla og søvn um livandi savnsvirksemi
- samstarv verður skipað millum ferðavinnu og bátasmíð



*Bátur verður smíðaður í Mikladali Mynd: Føroya Fornminnissavn*

## 3. Grundarlag fyri álitinum

Tá metast skal um tiltøk, ið kunnu skapa føroyskum bátasmíði livilíkindi, má støða takast til, um spurningurin um bátasmíð í høvuðsheitum skal síggjast úr einum vinnuligum ella einum mentanarligum sjónarhorni.

Marknaðurin fyri føroyska bátinum er lítil. Orsøkirnar kunnu vera fleiri, men meirvirðisgjaldið verður ofta nevnt sum steinur oman á byrðu.

Støðan hjá føroyska bátinum og bátasmíði miðskeiðis í 1990-árunum sæst best við at endurgeva hetta brotið í álitinum 'Avmarkaður marknaður' hjá landsstýrismanninum í mentamálum í sambandi við ráðlegging av mentanarpolitikki í framtíðini (1996):

> *"Føroyingurin hevur allar tíðir havt tørv á báti, sum rímiligt er í okkara oyggjasamfelag. Í dag eru glasfipurbátar vanligasta sjón í bátahylunum. Nógv eru sniðini og av ymsum uppruna. Teir eru arbeiðspláss og frítíðarítriv hjá nógvum føroyingum.*
>
> *Hin gamli báturin er um at hvørva. Handverkið doyr út. Bátasmiðirnir eldast, og eingir ungir eru í læru. Tað er stórur missur hjá eini tjóð.*
>
> *Hin føroyski báturin er eindømi. Hann er í ætt við bátarnar í grannalondunum, men bátasmiðurin hevur við tíðini lagað fjalirnar til viðurskiftini kring oyggjarnar. Hann hevur dugað tað serføroyska handverkið, sum latið var honum frá teimum, ið undan fóru. Tað tekur nógv ár at læra eitt handverk og øldir at kenna hugburðin í tí.*
>
> *Tað er tí stórt spell um vit, ið nú anda, søpla burtur tað dýra gullið, sum liggur í aldargamla føroyska bátasmíðinum. Báturin er partur av samleikaeyðkenni føroyinga. Hann eigur týðandi lut í mentan okkara..."*[1]

Í álitinum frá 1996 sæst ikki, hvussu føroyskt bátasmíð skal varðveitast, annað enn at staðfest verður, at handverkið er í vanda fyri at hvørva. Í hesum áliti verður staðfest, at støðan hjá føroyskum bátasmíði er tann sama í dag sum fyri 15 árum síðani, ella kanska verri.

Í álitinum frá 1996 verður staðfest, at føroyski báturin er partur av samleikaeyðkenni føroyinga, og at hann eigur týðandi lut í mentan okkara. Saman við teirri staðfesting, at eftirspurningurin eftir føroyska bátinum er støðugt minkandi, bendir hetta á, at spurningurin um at skapa føroyskum bátasmíði livilíkindi í størri og størri mun gerst ein mentanarligur heldur enn ein vinnuligur spurningur, og at tað í framtíðini fer at snúgva seg um at varðveita handbornu vitanina, ið liggur í føroyska bátasmíðinum fyri eftirtíðina.

Í upplivingarbúskapinum, ið er eitt felagsheiti fyri búskap, ið byggir á kreativar og mentanar- og upplivingarvinnur, renna mentanarlig og vinnulig sjónarmið saman.

Og tað er kanska her, í varðveitingini og í upplivingarbúskapinum, at livilíkindi hjá føroyskum bátasmíði verða skapt í 21. øld.

---

1 Bárður Jákupsson, Birita Mohr, Napoleon Nólsoy, Martin Næs og Jákup Thorsteinsson: Avmarkaður marknaður – álit til landsstýrismannin í sambandi við ráðlegging av mentanarpolitikki í framtíðini. Landsstýrismaðurin í mentamálum 1996, s. 145-146.

## 4. Søguliga gongdin fram til tað nýggja samfelagið – yrkisumhvørvini

Sambært søguligum keldum kann tann føroyski báturin førast aftur til miðju 17. øld. Hann kann vera eldri og byggja á fornar handverkstraditiónir, men enn eru eingi spor ella leivdir, ið kunnu siga, hvussu gamalt bátasmíð er í Føroyum. Fyrst í 17. øld brúktu føroyingar ein lítlan norskan bát, ein trist, men av tí at 50 bátar av hesum slagnum gingu burtur, og hetta bátaslag varð bannað, verður hildið, at tá fekk tann føroyski báturin sítt vakra og sjógóða skap. Tann føroyski báturin, sum vit kenna hann í dag, er ið hvussu er á leið 400 ára gamalur.

Upprunaliga smíðaðu teir bátar úti. Bátasmiðir ferðaðust millum bygdirnar og oyggjarnar og smíðaðu bát á staðnum. Teir ferðaðust við sínum amboðum í arbeiðskistu. Tá ið vit komu inn í 20. øld, fóru bátasmiðir innandura at smíða bát.

Føroyskir bátasmiðir hava ikki brúkt skabelónir, men mátistokk og tey mát, teir fingu frá teimum, sum undan gingu. Vitanin og kunnleikin til bátasmíð var eitt arvað handverk. Var pápin bátasmiður, lærdi hann sonin, og oftani hevur yrkið gingið í arv, men oftani var yrkið framíhjá. Síðst í 18. øld var tó eitt serligt yrkisumhvørvi í Nólsoy, har bátasmíð var vorðið høvuðsyrki, og menn komu hagar at læra handverkið. Somuleiðis var eisini eitt yrkisumhvørvi í Mikladali síðst í 19. øld. Í hesari bygdini vóru fleiri bátasmiðir um somu tíð. Har vóru eisini jarnsmiðir, ið smíðaðu seym og annað. Bátasmiðir í hesum yrkisumhvørvum í Nólsoy og í Mikladali hava skarað framúr, og fyrst í 20. øld sæst, at útbreiðslan av nólsoyar- og mikladalsbátum var um alt landið.

Handverksliga traditiónin hevur ein søguligan samanhang fram til 20. øld, tá ið tann gamli róðrarbáturin spakuliga mátti víkja fyri menningini í tí modernaða samfelagnum. Tá noyddust bátasmiðir at laga seg til ídnaðargerðina. Føroyskt bátasmíð stóð fyri fyrstu ferð við avbjóðingini, at tann gamli róðrarbáturin varð broyttur. Hann fekk tvey frábrigdi.



*Bátur verður smíðaður Mynd: Føroya Fornminnissavn*



*Fyrst í 20. øld. Róðrarbátar og teir nýggju motorbátarnir á Vestaruvág í Havn*
*Mynd: Føroya Fornminnissavn*

## 5. Gongdin í 20. øld – avbjóðingar og avmarkingar

Støðan hjá tí føroyska róðrarbátinum fyrst í 20. øld var tann, at teir slættbygdu, ella kravellbygdu bátarnir við dekki og motori – motorbátarnir, ella eisini seinni nevndir sluppungar, meir og meir vórðu tiknir í brúk til heimaútróður.

Í 1920-árunum fekk onkur av teimum gomlu róðrarbátunum motor – páhangara, ella smærri fastar motorar. Ein fastur ísettur motorur kravdi, at kjølurin har afturi stakk djúpri, og tí setti smiðir ein kíla upp undir kjølin. Tað var eisini neyðugt at styrkja sjálvan skrokkin, og á tann hátt var maskinbáturin ein ítøkilig tillaging av tí gamla bátinum.

Hitt frábrigdið var kapproðrarbáturin. Kappróður hevur helst altíð verið ein gamal siður í landinum, men í tjóðskapartíðini gjørdist kappróður fastur táttur, og í 1927 varð tann fyrsti kappróðrarbáturin smíðaður. Hesin bátur skuldi ganga skjótt, og vanligu dygdirnar hjá tí gamla bátinum vóru sleptar til frama fyri ferð í róðri. Kappróðrarbáturin hevði sæð dagsins ljós.

Sostatt sóust tvey nýggj frábrigdi av tí gamla róðrarbátinum:

- maskinbáturin
- kappróðrarbáturin

Gongdin í føroyskum bátasmíði í 20. øld var annars tann, at føroyski báturin ikki longur var ein róðrarbátur. Tillagingar í maskinorku høvdu við sær, at eftir kríggið í 1945 og fram til uml. 1970, tá ið føroyskir útróðrarmenn í stórum tali róðu út í Grønlandi, vórðu bátarnir smíðaðir bæði væl størri, breiðari, djúpri, og fingu eitt tyngri skap.

Í dag kann tann føroyski báturin flokkast í fýra sløg:

- róðrarbáturin
- róðrarbáturin við páhangsmotori
- maskinbáturin
- kappróðrarbáturin

Enn ein avbjóðing í nýggjari tíð var framleiðslan av bátum úr Kaldbak í 1970-80-árunum. Hesir bátar høvdu róðrarbátin sum fyrimynd, summir vóru frambygdir. Teir vóru ikki smíðaðir úr timbri, men stoyptir úr glastrevju. Bátarnir úr Kaldbak vóru væl umtóktir. Teir kravdu minni viðlíkahald enn føroyski báturin, sum kravdi meira tíð til vask, reinsing og máling.

## 6. Samleiki og mentanararvur

Uttan at fara í smálutir at greina samleika sum hugtak – samleikarnir eru nógvir, og uttan at greina mentan sum hugtak – tað eru eisini fleiri mentanir, so síggjast bæði samleiki og mentan í fleiri fláum og í fleiri høpum. Samleiki og mentan eru samantvinnað hugtøk, og eitt ávíst samband er millum tann samleika, og ta mentan, ið fólk eru felags um.

Føroyski tjóðarsamleikin er ein staðbundin samleiki. Tað eru nøkur mentanarlig eyðkenni, ið síggjast aftur, ella heldur ímyndir, ið vísa til eina føroyska mentan, og ein føroyskan samleika. Hesi eyðkenni hava symbolsk virði, og fyri at nevna nøkur, so skulu millum annað føroyski maturin, føroyski búnin, føroyski dansurin og grindadráp skiljast sum serføroysk mentanarlig fyribrigdi.

Av hesum hevur tann føroyski báturin, sum var alneyðugur brúkslutur í øldir, eisini havt eitt sterkt og sjónligt symbolvirði. Tað sæst í tí endurgivna brotinum frammanfyri í álitinum í 1996, har ið víst verður á, at handverk og bátur eru um at hvørva, at báturin er eindømi, og av tí at hann er partur av samleikaeyðkenni hjá føroyingum, so er tað neyðugt at varðveita hann.

Mentanararvur er eitt annað hugtak. Tað vísur til tey virði, sum eru í eini mentan, ella sagt øðrvísi, so er mentanararvurin tað ítøkiliga grundarlagið, ið mentanin byggir á her og nú. Mentanararvurin verður brúktur at lýsa tey lið og tær luteindir, ið siga frá okkara felags minni um okkara felags fortíð.

Aloftast verður skilt ímillum tann materiella og tann immateriella mentanararvin. Tann seinni arvurin er m.a. um, og umfatar, traditiónir, siðir og siðvenjur, og kann lýsast sum nakað, ið hevur við vitan og kunnleika at gera, og sum er góðkent sum ella viðurkent sum partar av mentanararvinum hjá einum bólki, fólki, samfelagi ella landi. Bátagranskarin Andras Mortensen sigur, og vísir til fólkalívsfrøðingin Olof Hasslöf, at handanin av vitan og kunnleika fer fram við ymiskum samskiftis- ella traditiónsmiðlum:

*"Handanin fer fram millum ymiskar einstaklingar, bólkar og stovnar, bygdir og lond, um lond og høv, millum ættarlið, í áratíggju og millum øldir."*[2]

2 Andras Mortensen: Hin føroyski róðrarbáturin, s. 16.

Meðan báturin er partur av tí materiella mentanararvinum, so er bátasmíð, og vitanin og kunnleikin til sjálvt yrkið, partur av tí immateriella mentanararvinum. Hesin arvur eigur at tryggjast, eyðmerkjast, skjalfestast og styrkjast umvegis formliga sum óformliga útbúgving. Hann eigur við øðrum orðum at tryggjast við nøktandi livilíkindum, og tað er ein mentanarpolitisk uppgáva at tryggja varðveitingina av hesum siðbundna handverki.

Í 2003 samtykti UNESCO-sáttmálan um verju av immateriellum mentanararvi. Ein partur av sáttmálanum snýr seg um verju av siðbundnum handverki. Sáttmálin skal tryggja, at handverkið framhaldandi er til, og at vitanin um handverkið verður borin víðari til komandi ættarlið. Tiltøkini, ið skulu verja immateriella mentanararvin, fevna millum annað um skráseting, gransking og útbúgving. Í sáttmálanum er millum annað ásett, at londini, ið taka undir við sáttmálanum, miða eftir at skapa karmar, ið tryggja, at immeterielli mentanararvurin, eitt nú siðbundið handverk, framvegis hevur sítt livandi virki í samfelagnum.

Sáttmálin var settur í gildi í Íslandi í 2005, í Noregi í 2007, í Danmark í 2010 og í Svøríki í 2011.

**Samanumtikið**
Mett verður, at arbeiðið við at varðveita immateriella mentanararvin, og harundir føroyskt bátasmíð, eigur at verða skipað eftir somu kørmum sum í grannalondum okkara, og at Føroyar tí eiga at taka undir við UNESCO-sáttmálanum um verju av immateriella mentanararvinum. Í hesum sambandi eigur føroysk lóggáva á viðkomandi økjum at verða dagførd.

Mælt verður til, at miðað verður ímóti at taka undir við UNESCO-sáttmálanum um verju av immateriellum mentanararvi í 2013.



*Bátasmiðurin Jóhan Danielsen í Garði, Nólsoy Mynd: Føroya Fornminnissavn*

## 7. Báturin á savn – báturin á livandi savn

Sambært landsins savnslógum – t.e. løgtingslóg um fornminnissavn, og løgtingslóg um bygdasøvn[3] – er uppgávan hjá Føroya Fornminnissavni og hjá landsgóðkendum bygdasøvnum at umsita tann materiella mentanararvin. Í § 2 í lógini um fornminnissavn stendur m.a., at Føroya Fornminnissavn skal "savna, skráseta og framsýna fornlutir og lutir frá nýggjari tíð, sum lýsa livihátt, starvslíkindi og mentan Føroyinga til ymsar tíðir ella eru knýttar til søguligar hendingar", men einki um siðbundið handverk. Við atliti at bátinum sæst niðanfyri, hvat gjørt hevur verið síðan miðskeiðis í 20. øld á føroyskum søvnum. Harnæst verður hugt at, hvussu nøkur søvn í grannalondunum hava gjørt fyri at varðveita bátin, og hvussu tey royna at varðveita bátasmíð.

**Føroya Fornminnissavn og onnur søvn í Føroyum**
Tann føroyski báturin er varðveittur. Um tað mundið, tá ið Bátahøllin á Debesartrøð varð bygd í 1952, vóru teir fyrstu bátarnir settir í framsýning á Fornminnissavninum. Á Fornminnissavninum er eitt stórt í vavi og breitt tilfar um tann føroyska bátin. Tilfarið er eitt nú munnligt frásagnartilfar, skjøl, uppmátingar og tekningar, rúgvismikið myndatilfar, og somuleiðis stórt gripatilfar sum handamboð og aðrir gripir, ið hava tilknýti til bátin. Í 2010 fekk Føroya Fornminnissavn alla smiðjuna hjá bátasmiðinum Niclas í Koltri. Tað eru javnan alskyns fyrispurningar um tann føroyska bátin, eins og tey vitjandi í framsýningini vísa bátunum stóran áhuga. Í dag eru uml. 30 bátar í øllum støddum bæði í føstu framsýningini og á goymslu. Í sambandi við tann føroyska bátin eru uppgávurnar hjá Føroya Fornminnissavni at savna inn og skráseta, og gomul handverk hava sjálvsagdan áhuga. Aðrar uppgávur eru at skjalfesta og miðla bátin á framsýningini og skúlatænastuni, og at fáa størri innlit í ástøðiligari vitan um bátin. Á Føroya Fornminnissavni fór fyri nøkrum árum síðan fram ein umfatandi granskingarverkætlan um tann føroyska róðrarbátin.[4]

Føroya Fornminnissavn hevur staðfest, at føroyskt bátasmíð er næstan ein farin tíð, at báturin er ein søguligur savnsgripur og partur av mentanararvinum, og bátasmiðir, sum útinna eitt gamalt handverk og hava vitanina og kunnleikan til yrkið, eru stutt sagt mentanarberar.

Føroya Fornminnissavn staðfestir eisini, at tilboð til skúlanæmingar, bæði í fólkaskúla, miðnámi og øðrum skúlum, eru ein týðandi liður í at føra vitanina um føroyska bátin og føroyskt bátasmíð víðari til komandi ættarlið. Fornminnissavnið hevur eina skúlatænastu, ið tekur ímóti skúlaflokkum alt árið, og hevur møguleika at miðla vitanina um føroyska bátin, men higartil hevur ikki verið møguligt at miðla sjálvt handverkið.

Norðoya Fornminnasavn hevur eisini savnað inn føroyskar bátar, uml. 10 í tali, og nú um dagarnar fer bátasmiðjan hjá Hans Christoffer Hansen á Miðvágs Bygdasavn. Í Leirvík er bátasavn við fimm bátum, og lutum, ið knýta seg til útróður og annað. Vandi er sostatt ikki fyri, at tann føroyski báturin ikki verður varðveittur, og somuleiðis sæst, at amboð og útgerð hjá bátasmiðum eru í varðveitslu í øllum førum á Føroya Fornminnissavni, í Klaksvík og í Miðvági, og onnur bygdarsøvn hava eisini varðveitt bátar, amboð og útgerð, sum hevur tilknýti til tann føroyska bátin. Í 1990-árunum smíðaði bátasmiðurin Símun Jóhan Wolles nýtt áttamannafar til Eiðis Bygdasavn. Til bátin hava fólk á Eiði gjørt eitt ullsegl, soleiðis sum gamalt var har.

---

3 Løgtingslóg nr. 32 frá 2. mai 1952 um fornminnissavn, seinast broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 9. apríl 1964, og løgtingslóg nr. 17 frá 9. mai 1972 um bygdasøvn við mentanarsøguligum týdningi, bróytt við løgtingslóg nr. 88 frá 17. juli 1986.

4 Sí tilvísing nr. 2.

**Samanumtikið**
Løgtingslóg um fornminnissavn ásetir, at tað er virkisøki hjá savninum at savna, skráseta og framsýna fornlutir og lutir frá nýggjari tíð, sum lýsa livihátt, starvslíkindi og mentan føroyinga til ymsar tíðir ella eru knýttar til søguligar hendingar. Harafturímóti er varðveitslan av siðbundnum handverki ikki ítøkiliga staðsett í føroyskari lóggávu.

Arbeiðsbólkurin metir, at føroyska lóggávan á savnsøkinum eigur at verða dagførd, soleiðis at hon eisini fevnir um verju av immateriellum mentanararvi, og harvið eisini av siðbundnum handverki. Mælt verður til, at uppgávan verður staðsett á Søvnum Landsins, ið longu varðar av materiella mentanararvinum. Hetta er eisini í tráð við ásetingarnar í UNESCO-sáttmálanum til verju av immateriellum mentanararvi, har mælt verður til, at uppgávan verður staðsett á viðkomandi stovni, v.ø.o. hjá tí myndugleikastovni, ið yvirskipað varðar av mentanararvi landsins.

Miðlan av føroyska bátinum og bátasmíði til børn og ung er avgerandi fyri, at áhugin fyri og vitanin um bátin og bátasmíð verður førd víðari til komandi ættarlið. Mælt verður tí til, at atlit verða tikin at tørvinum hjá hesum málbólki í øllum teimum tiltøkum, ið verða stuðlað við almennari játtan. Talan kann eitt nú vera um undirvísingartilfar, vitjan á søvnum og upplivingar í sambandi við bátin og bátasmíðið.



*Bátar á framsýning hjá Føroya Fornminnissavni   Mynd: Føroya Fornminnissavn*

## 8. Livandi søvn í grannalondunum

Í fleiri av grannalondunum verður arbeitt við at varðveita siðbundið bátasmíð. Niðanfyri eru dømi úr nøkrum av grannalondunum, har bátasmiðjur eru knýttar at søvnum. Yvirhøvur sæst, at savn og smiðja ganga saman um at varðveita gomul handverk.

**Shetland Museum and Archives**
Á nýggja savninum við gomlu havnina í Lerwick, Shetland Museum and Archives, hevur siðbundni hetlendski báturin fingið sína egnu bátahøll og bátasmiðju. Bátasmiðjan á Shetland Museum and Archives er í somu hølum, ið vórðu riggað til sum bátasmiðja í 1844 hjá felagnum Hay & Company. Fyrstu bátarnir vórðu smíðaðir á savninum í 2008, ein sixareen – ein "seksæringur" og ein minni haddock boat. Hesin sixareen var smíðaður eftir "Industry", smíðaður í 1891, og hann er tann fyrsti, ið er smíðaður í Lerwick í yvir 100 ár.

Bátasmiðjan virkar sum livandi savn, og skúlabørn og vitjandi kunnu fylgja við, meðan bátar verða smíðaðir og umvældir. Um sumrarnar sleppa skúlabørn og vitjandi eisini at royna seg í bátunum. Í 2010 vórðu fýra gamlir bátar umvældir, og nú er ætlanin at umvæla einar 2-3 bátar árliga.

Tað er Shetland Islands Council, ið eigur bátarnar á savninum, og Shetland Museum and Archives fær eina árliga játtan til varðveiting av bátasavninum. Bátasmiðirnir eru ikki beinleiðis knýttir at savninum. Dr. Ian Tait, savnvørður á Shetland Museum and Archives, metir, at siðbundni hetlendski báturin fyri ein stóran part er at meta sum savnslutur heldur enn livandi handverk. Bert hendinga bátur av gamla slagnum verður smíðaður í Hetlandi, og eingin bátasmiður livir av at smíða siðbundnu bátarnar burturav. Orsøkin er, at marknaðurin ikki er nóg stórur.

**Vikingeskibsmuseet i Roskilde**
Savnið, Vikingeskibsmuseet í Roskilde, er skipað sum sjálvsognarstovnur við trimum deildum:

- Gransking, marinarkæologi og framsýningar
- Maritim handverk, endurskipan og miðlan
- Umsiting og rakstur av bygningum

Bátasmiðjan er partur av deildini, ið hevur maritim handverk, endurskipan og miðlan um hendi. Á bátasmiðjuni smíða tey súðubygdar bátar. Endamálið er at varðveita maritim handverk. Bátasmiðjan hevur serliga lagt seg eftir at smíða bátar, ið hava upprunaskap, og í fullari støðd. Umframt at smíða og umvæla bátar, virkar bátasmiðjan sum ráðgevi í verkætlanum í Danmark og aðrastaðni. Roknskaparliga er bátasmiðjan skild frá savnsrakstrinum, so at virksemið á savninum ikki skal vera kappingaravlagandi í mun til privatar bátasmiðir. Í løtuni eru tó ongir aðrir bátasmiðir, ið fáast við at smíða hesar bátar burturav, og tí átekur savnið sær hesa uppgávu.

Søren Nielsen, deildarleiðari, sigur, at orsøkin til, at bátar ikki verða smíðaðir longur, er, at fólk ikki vilja gjalda fyri mongu arbeiðstímarnar, ið mugu til fyri at smíða hesar bátar. Tey hava stórt tal av neyvt eftirgjørdum víkingaskipum og søguligum bátum, eisini føroyskum, sum hava vísindaligan áhuga, eins og heilt nógv sigling er við skúlaflokkum og ferðafólki um sumrarnar.

**Oselvarverkstaden**
Bátasmiðjan á Osøyro, Oselvarverkstaden, í Noregi, lat upp í juni 1997. Endamálið er at varðveita bátasmíð eftir gomlum handverkssiðum. Strong krøv eru til góðsku og til at føra kunnleikan um bátasmíð víðari, og at seta yngri bátasmiðir við. Tað er Os kommuna, sum setti á stovn grunnin

Oselvarverkstaden við stuðli frá Norsk kulturråd og Hordaland fylkiskommunu. Grunnurin er skipaður við einum stýri, og formaðurin er úr Norsk handverksudvikling, meðan limirnir koma frá eitt nú Oslo Universiteti og Hordaland fylkiskommunu.

Tað fyrsta, ið er skrásett um bátasmíð í Os er fyrst í 1500-talinum, tá ið bátar vórðu seldir úr Os til Bergens, men bátar hava verið smíðaðir í Os væl fyri hesa tíð. Oselvarbáturin hevur røtur í gamla súðubygda bátinum, og sum aðrastaðni fram við norsku strondini var bátasmíð eisini eitt týðandi handverk í Os. Tá ið plastbáturin kom um 1960, var skjótt, at marknaðurin fyri bátar úr viði minkaði munandi. Í 1977 vóru bert tveir bátasmiðir eftir í Os. Í 1979 varð í samstarvi við Hordamuseet skipað fyri skeiði í bátasmíði av Oselvara. Hetta var í síðstu løtu, tí stutt eftir fullu gomlu bátasmiðirnir frá. Síðst í 1980-árunum vóru ætlanir frammi um ein verkstað, og í 1997 flutti grunnurin Oselvarverkstaden inn í høli, ið Os kommuna hevði latið byggja við ósan í Os. Fýra bátasmiðir vórðu knýttir at Oselvarverstaden.

Sambært upplýsingum frá 2006 vóru omanfyri 50 bátar smíðaðir á verkstaðnum. Tríggir lærlingar høvdu staðið eina “fakroynd”. Á verkstaðnum er lærumeistari, ið sær til, at teir yngru bátasmiðirnir fáa kunnleika til traditiónsborna handverkið. Ein kvinna hevur lært á Oselvarverkstaden og er í starvi sum bátasmiður. Verkstaðurin fær stuðul til rakstur frá kommununi og fylkiskommununi til virksemið.

Trý sløg av bátum kunnu bíleggjast frá Oselvarverkstaden: Bruksbåt, Stasbåt og Kvistfri Stasbåt. “Færingar” – við fýra árum, eru teir vanligastu bátarnir, men eisini “seksæringar” – við seks árum, og størri bátar verða smíðaðir. Kostnaðurin við MVG fyri ein ”færing” – 565 cm, er úr NOK 84.000 fyri ein ósmurdan stasbåt, meðan ein liðugur bátur kostar NOK 105.000. Bíleggingartíðin er 2-3 ár.

**Hardanger fartøjvernsenter**
Á Hardanger fartøyvernsenter er ein bátasmiðja, ið smíðar smærri bátar úr viði: Hardangerbátin og Strandebarmar. Hardanger fartøyvernsenter er partur av Hardanger Voss Museum. Endamálið er at varðveita og føra víðari ta handbornu vitan, ið er knýtt at vali av tilfari, arbeiðshátti og brúki av amboðum til at smíða smábátar frá Hardanger. Ein týðandi partur av arbeiðinum er at skjalfesta søguligu gongdina og miðla bátasmíð. Tann siðbundni hardangerbáturin er partur av vesturnorska arvinum við teimum lættu súðubygdu bátunum við árum og segli. Aðrir siðbundnir bátar verða eisini smíðaðir, eins og umvælingar verða gjørdar. Umleið helvtin av virkseminum á bátasmiðjuni hevur seinni árini umfatað uppmátingar, støðumetingar og restaurering av eldri bátum. I 2011 eru tveir útbúnir bátasmiðir og ein lærlingur knýttir at bátasmiðjuni. Síðan 1987 eru 90 nýggir bátar smíðaðir. Umleið 20 lærlingar hava verið knýttir at bátasmiðjuni.

Kostnaðurin uttan MVG fyri ein “færing” er úr NOK 81.000 fyri ein óviðgjørdan skrokk, meðan ein liðugt gjørdur og tjøraður “tiæring” – við tíggju árum, kostar NOK 288.400. Bátasmiðjan ger eisini teir smærru Strandebarmar, ið kosta nakað minni. Ein óviðgjørdur skrokkur kostar NOK 55.000.

Á Hardanger Fartøyvernsenter er eisini ungdómsdeild við tilboðum fyri upp til 7 ungum millum 16-23 ár við sosialum trupulleikum. Ungdómsdeildin skipar sítt virksemi við at menna tey ungu kring bátasmiðjuna og maritima umhvørvið har.

**Samanumtikið**
Sum vit síggja tað í Hetlandi, Danmark og í Noregi, er siðborna vitanin um bátasmíð knýtt at søvnum. Tað er vert at umhugsa, um sami leistur skuldi verið fylgdur í Føroyum.

## 9. Umhvørvi á landi – nakrar ætlanir um livandi bátasavn

Ymsastaðni í landinum eru umhvørvi og bólkar, ið eru um tann føroyska bátin. Her verða nakrar ætlanir lýstar, ið hava ynski um at skapa bátaumhvørvi og karmar fyri livandi bátasavn.

**Vágur**
Felagið Grindabátar í Vági heldur lív í mentanini við føroyska róðrarbátinum. Í felagnum eru uml. 10 bátar. Tann elsti er Gjógvarábáturin, smíðaður í 1873, harímillum eru eisini eldri kappróðrarbátar. Tað eru eisini nakrir av teimum gomlu vestanbátunum. Flestu teirra eru seksmannafør. Teir vórðu brúktir at rógva út av Vágseiði. Teir flestu grindabátarnir eru átta- og tíggjumannafør, ið vórðu brúktir til havútróður eystanfyri, at føra torv við, til flutning, í grind og til Havnarferðir.

Grindabátarnir í Vági eru framvegis í brúki, bæði í grind og til útferðir. Tá verður róð og siglt við seglum. Seinastu árini hava bátarnir gjørt ferðir av Vágseiði til Fámjins, til Sumbiar og av Vágsfirði til hinar bygdirnar í oynni, eins og aðrar ferðir kring landið og uttanlands. Tey uml. 100 fólkini, sum eru við á hesum grindabátaferðum, eru ung, tilkomin og eldri, kvinnur og menn.

Ynskið er at hava framsýning og annað virksemi í tí sonevnda Vaskiskúrinum, á Pumpiloftinum, í Stóra Pakkhúsi, á Garðabrúgv og í nøkrum gomlum neystum nærhendis. Umrødda Stóra Pakkhús, sum er í sama umhvørvi, er mentanarhús, og her húsast eisini Vágs Sóknar Bygdasavn, og Garðabrúgv er gjørd av nýggjum. Vágs kommuna hevur eina serliga byggisamtykt fyri økið á Gørðunum. Millum teir áhugaðu partarnar í verkætlanini eru: bátasmiðir í Vági, Vágs Sóknar Bygdasavn, Vágs Kappróðrarfelag, TG 326 Jóhanna, Vágs kommuna og onnur. Fremstu málini eru at menna livandi mentanina við føroyska róðrarbátinum og at varðveita gomul snið av bátum.

Um grindabátarnar í Vági: www.grindabatar.com



*Umhvørvið á gørðunum í Vági   Mynd: Rúna Hjelm*

**Klaksvík**
Í Klaksvík verður arbeitt við eini ætlan at hava bátasavn og bátasmiðju í Gamla Spinnaríi hjá handilsfyritøkuni J.F. Kjølbro. Klaksvíkar Kommuna hevur tikið avgerð um at seta á stovn Grunnin Spinnaríið, sum skal eiga, varðveita og reka Spinnaríið, sum skal umvælast og gerast til mentanarhús til siðbundið handverk og list. Grunnurin verður formliga skipaður í næstum.

Eitt uppskot er at brúka ovaru hæddina til bátasavn og bátasmiðju. Ætlanin er, at Spinnaríið kemur at sýna fram eldri róðrarbátar, útgerð og fiskireiðskap. Talan verður um eitt livandi savn, ið bæði føroyingar og ferðafólk kunnu fáa gagn av. Bátasavnið vil skipa fyri tiltøkum um bátin og søgu hansara og ætlanin er eisini at smíða onkran bát av og á.

Um verkætlanina í Klaksvík: www.spinnariid.com

**Svínoy**
Eitt triðja uppskot er at hava bátasavn í Svínoy í einum ætlaðum bygdarhúsi. Í Svínoy hava eisini verið kendir  bátasmiðir, m.a. feðgarnir Poul Hansen, ættaður úr Norðnástovu í Mikladali, og sonurin Poul Johannes Poulsen, í Yvirstovu í Svínoy. Í løtuni standa 15 bátar í neystum á Eiðinum og heima í bygdini.

Tey, sum varða av ætlanini staðfesta, at eitt av fremstu handverkum er um at fara í søguna, og eitt savn í Svínoy við verkstaði hevði hjálpt til at varðveitt handverkið. Ætlanin er at skipa fyri skeiðum í bátasmíði, og dentur verður lagdur á, at bátarnir verða brúktir.

Tey áhugaðu í verkætlanini halda, at hetta kann gerast veruleiki um so er, at bygdarhúsið verður reist, og bygdarhúsfelagið vaknar aftur.

fyrireikararnir meta, at kostnaðurin fyri bygdarhús og bátasavn undir somu lon fer at vera um 6,3 mió. kr. Ætlanin skal leggjast fyri Klaksvíkar kommunu og síðani fyri mentanarmyndugleikar landsins.

**Économusée**
Í sambandi við føroysku ætlanirnar er vert at nevna Économusée. Hetta er upprunaliga eitt kanadiskt verkætlanarfyribrigdi, ið skal síggja til at menna dygdarvørur til bæði heimamarknaðin og ferðavinnuna. Ein slík verkætlan verður grundað á siðbundið handverk og list.

Í 2008 kom Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning við í verkætlanina Économusée Northern Europe, sum í trý ár menti Économusée-tiltøk í Føroyum, Grønlandi, Íslandi, Noregi og í Írlandi. Hetta er gjørt í tøttum samstarvi við Kanada.

Grundsjónarmiðið er at skapa eitt netverk, ið hevur sum uppgávu at marknaðarføra, at halda lív í siðbundnum handverki, og at hjúkla um handbornan kunnleika. Netverkið skipar og mennir smá virki innan listahandverk og siðbundin handverk. Virki, sum eru partar av Économusée, lata dyrnar upp fyri almenninginum og bjóða læruríkar og áhugaverdar upplivingar. Eitt Èconomusée skal bera seg fíggjarliga. Um ikki, letur tað aftur.

**Ein Économusée-verkætlan er býtt upp í 6 partar:**

Móttøka: Handverkarin tekur ímóti, og gestirnir verða bodnir vælkomnir

Verkstova: Framferðarháttur og handverk verður víst í verki

Framsýning: Vísir søguna og tøknina aftan fyri handverkið, í mynd og teksti

Nýmenningarøkið: Bjóðar ungdómi og listafólki at skapa nýtt burtur úr siðbundna handverkinum

Dokumentatión: Høvið verður at lesa og seta seg meira inn í evnið

Handil/kafé: Tað er gjørligt at keypa siðbundnar og nýmótans vørur, framleiddar á verkstaðnum, og njóta eina løtu við einum kaffimunni

Jarnsmiðjan á Trøllanesi er skipað sum Économusée. Málið er at fáa 2 ella 3 Economusée afturat í Føroyum tey næstu 3 árini.

Stýrið fyri Economusée í Føroyum hevur í mars 2012 tikið avgerð um at fara undir at skipa bátasmiðjuna hjá Jóhan Olsen á Tvøroyri sum Economusée. Jóhan Olsen hevur bátasmiðju á Lítla Tippinum á Tvøroyri, har ætlanin er at vitjandi fáa høvi at síggja handverkið. Ætlanin er eisini, at vitjandi skulu sleppa í bát við árum, seglum ella motori.

Um Economusée: www.economusee.no

**Samanumtikið**
Hóast føroysku ætlanirnar enn ikki eru veruleiki, byggja tær á somu grundsjónarmið sum í grannalondum okkara við eini bátasmiðju knýttari at einum livandi savni.

Arbeiðsbólkurin hevur ikki tikið støðu til einstøku verkætlanirnar, men um ætlanin er, at livandi søvnini skulu virka sum varðveitarar av siðbundnu handverksmentanini, er neyðugt, at tey innganga í eina skipan, ið fevnir um dokumentatión, eftirlit og gransking.

Mælt verður tí til, at stuðul til livandi søvn verður skipaður í tráð við aðra stuðulsveiting á savnsøkinum, eitt nú stuðul til bygdasøvn, og at savnslóggávan verður dagførd tilsvarandi. Víst verður tó á, at játtanin til stuðul til savnsvirksemi er smábýtt, og at rúm tí valla er fyri nøktandi stuðli til livandi søvn innan verandi karmar. Mælt verður til, at Mentamálaráðið tekur hetta við í raðfestingum sínum í komandi fíggjarlógum.

## 10. Bátaumhvørvi í dag

Nú vinnuliga brúkið av føroyska bátinum má metast at minka, er áhugavert at hyggja eftir, hvør brúkar tann føroyska bátin í dag – og hvussu hann verður brúktur.

Tann føroyski báturin livir sítt egna lív í ymsum høpum sum ítriv hjá fólki, ið eru virkin í ymsum felagsskapum. Fyrst av øllum er kappróðurin tjóðarítrótt. Harnæst finna fólk saman til sigling á firðunum, og bátafeløg virka fyri at varðveita tann føroyska bátin og brúka hann, tá ið tiltøk eru. Hetta eru avgjørt virði, sum ikki skulu undirmetast. Síðani eru nakrar ætlanir úti um landið at seta á stovn bátasmiðjur og bátasøvn, sum ætlandi skulu vera livandi umhvørvi, og har ynskið er at varðveita handverkið.

**Kappróður**
Í nýggjari tíð byrjaði kappróður í smáum sum ítróttagrein á ólavsøku í 1887. Í 1924 gjørdist ólavsøkuróðurin ein fastur táttur. Í 1927 lótu vestmenningar smíða tann fyrsta kappróðrarbátin, og tretivu ár seinni smíðaði Niclas í Koltri sín fyrsta kappróðrarbát, áttamannafarið 'Miðving'. Hansara mát vóru á leið tey, sum Ítróttasamband Føroya setti í gildi uml. 1960. Tað var neyðugt at fáa bátarnar at líkjast so nógv sum til bar, bæði í vekt, longd og dýpd. Hesi mát vórðu endurskoðað seinni.

Sum ítróttagrein var kappróður skipaður sum róðrardeild undir ÍSF, Ítróttarsambandi Føroya, og síðan 1980 av Róðrarsambandi Føroya, ið er sersamband í ÍSF. Kappast verður á stevnum, og kappingarárið endar á ólavsøku. Róðrarsambandið roynir at laga til ymisk viðurskifti sum fastan start, dómaraskipan, nýggjar bátastøddir, aldursbólkar og annað mangt.



*Kappróður í Sandavági   Mynd: Føroya Fornminnissavn*

Róðrarsamband Føroya er eitt virkið sersamband, og sambært heimasíðu sambandsins, www.rsf.fo, hevur tað hesi feløg úti um landið sum síni limafeløg:

**Limafeløg í Róðrarsambandi Føroya**

Argja Róðrarfelag
Árnafjarðar Róðrarfelag
Froðbiar Sóknar Róðrarfelag
Haldarsvíkar Róðrarfelag
Havnar Róðrarfelag
Hósvíkar Róðrarfelag – HVR
Hvalvíkar Streymnesar Róðrarfelag
Húsavíkar Kappróðrarfelag
ÍF, róðrardeild
Royn, róðrardeild
Kappróðrarfelagið NSÍ
Klaksvíkar Róðrarfelag
KÍF, róðrardeild
Kvívíkar Sóknar Róðrarfelag – K.S.R.
LÍF, róðrardeild
Miðvágs Róðrarfelag
Norðdepils-Hvannasunds Róðrarfelag
Nólsoyar Ítróttarfelag – NÍF
Oyndarfjarðar Ítróttafelag, róðrardeild
Róðrarfelagið Knørrur
Sandavágs Ítróttarfelag – SÍF
Skála Róðrarfelag
Strálan
Suðuroyar Kappróðrarfelag
Sumbiar Ítróttafelag, róðrardeild
Sunda Róðrarfelag – SU.R.F.
Sørvágs Róðrarfelag – SR
Tofta Ítróttafelag, róðrardeild
Vágs Kappróðrarfelag – VK
Vestmanna Ítróttarfelag – VÍF

Tað er ikki á hvørjum ári, at øll hesi róðrarfeløg eru virkin, ella fáa mannað allar bátarnar, men eingin ivast í, at kappróðurin hevur gjørt sítt til, at áhugi er fyri tí føroyska bátinum. Annað er, at kjak tíðum hevur verið um, at róð átti heldur at verið við tí gamla róðrarbátinum, og ikki við kappróðrarbátum. Bátasmiðurin Símun Jóhan Wolles hevði hesa áskoðan í 1978:

> *"Men eitt stórt mistak er gjørt í føroyskum bátasmíði. Vit áttu ongantíð at broytt sniðið í bátinum til kappróðrarbátar. Teir høvdu síni mál, og kundi kappróður eins væl farið fram í dygdargóðum bátum, ístaðin fyri nú, teir eru so burturpískaðir, og púra ónýtiligir til annað enn kappróður á deyðavatni."* [5]

Taka vit bátasmiðin Niclas í Koltri fram aftur, so gjørdist hann serliga kendur fyri sínar kappróðrarbátar, og tað ber til at siga, at hann í stóru broytingartíðini í seinnu helvt av 20. øld var við til at halda lív í føroyskum kappróðri, meðan kappróðurin hinvegin eisini gjørdi, at Niclas í Koltri sjálvur kundi halda fram við sínum handverkskynstri. Nú smíðar Sámal Hansen í Runavík teir flestu kappróðrarbátarnar og hevur seinastu árini mestsum havt allan marknaðin.

Róðrargrunnur Føroya var settur á stovn í 1970 at stuðla smíði av kappróðrarbátum. Innsavning fór eisini fram, men av tí at grunnurin er lítil, hevur hann ikki verið virkin í fleiri ár.

5 Símun Jóhan Wolles: "Úr bátasøguni". Dagblaðið nr. 33, 5. mai 1978.

**Sigling**
Fyrsta kappsiglingin við fýra- og fimmannaførum varð fyriskipað av Lions Club Eysturoy í 1970. Síðani hevur ein sigling verið á hvørjum ári. Uml. 180-200 ymiskir bátar hava luttikið hesi árini.

Í 1995 varð áhugafelagið Seglið stovnað, og síðan hevur verið skipað fyri 2-3 kappsiglingum hvørt summar, mest á bygdastevnum, men eisini til tiltøk í Kollafirði, Kaldbak, Hvítanesi-Havn, á Nesi-Toftum-Saltnes, Runavík-Saltangará-Glyvrar, á Strondum-Skála, Gøtu, Leirvík, Klaksvík, Kvívík-Vestmanna og til okkurt tiltak í Suðuroy. Kappsiglingar hava eisini verið í sambandi við Sjómannadagin í Klaksvík og vestanstevnu í Miðvági. Tá var siglingin á Vatninum.

Nógvir bátaeigarar hava fingið sær bátavognar, so bátarnir kunnu flytast millum siglingarstøðini. Vanliga eru 2-3 fólk í hvørjum báti, seglið er 6,5 $m^2$, og øll vanlig bjargingarútgerð er kravd. Seinastu árini er bátatalið minkað nakað. Í 2010 var miðaltalið millum 14 og 20 á hvørji kappsigling. Aldurin á bátunum er væl yngri nú enn í fyrstani, tí nógvir nýggir bátar eru smíðaðir, eisini bert við kappsigling fyri eyga, tvs. at bátarnir eru heldur smalari og væl léttari, enn tá ið teir eru smíðaðir til motor.

Endamálið hjá Seglinum er m. a. at fáa vind aftur í seglini, læra fólk at brúka bátar og segl, har tey eldru læra tey yngru.



*Dvørgamoy á Toftum verður mannað Mynd: Regin Debess*

**Bátafeløg**
Í nýggjari tíð eru fleiri bátafeløg sett á stovn. Hesi eru um tann føroyska bátin. Í 1990 læt ein áhugabólkur í Havn og Suðurstreymoy seksæringin, nevndur Greipur, smíðað av Símun Jóhan Wolles, bátasmiði. Báturin stendur í neysti í Akkersvík á Hvítanesi. Tann seinasti stóri róðrarbáturin er áttamannafarið Sedna, ið Terji Reinert Jacobsen smíðaði í 2003 til Greipafelagið. Báturin hevur tilhald á Argjum og verður brúktur til skúlanæmingar.

Í 1992 varð fundur hildin í Vági við umboðum fyri gomlu grindabátarnar. Endamálið var at fyrireika eina grindabátastevnu, og fólk fóru alt fyri eitt undir at hampa um bátarnar. Ein grindabátastevna varð hildin sama ár á Vágsfirði, og børn sluppu at rógva í bátunum. Síðani hava fleiri tiltøk verið við teimum uml. 10 grindabátunum í Vági. Útferðir eru gjørdar og framsýningar hava verið. Hetta eru seks-, átta- og tíggjumannafør. Elsti báturin er frá 1873, og nýggjasti grindabáturin er smíðaður í 1970. Flestu teirra eru gamlir bátar, og ivasamt er, um teir tola ov nógva nýtslu.

Á Tvøroyri varð bátafelagið Naddoddur stovnað í 1995. Jóhan Olsen smíðaði í 1997 størsta seksæring í landinum til árar og segl. Felagið hevur gjørt ferðir við bátinum Naddoddi til Noregs og Íslands. Eisini hava teir eitt pakkhús sum felagshús á Hvítanesi á Tvøroyri.

Á Toftum er bátafelagið Dvørgamoy og hevur tíggjumannafarið við sama navni, riggað við árum og seglum til útferðir, siðsøgulig tiltøk, skótar og skúlanæmingar. Báturin tekur lut á siglingarstevnum kring alt landið.

Felagskapurin Kiwanis hevur seinastu nógvu árini latið fýramannafør smíðað av ymiskum bátasmiðum at luta burtur á ólavsøku. Nógvir av hesum bátum síggjast aftur í kappsiglingum um sumrarnar.

**Samanumtøka**
Sum sæst eru felagsskapir og einstaklingar um tann føroyska bátin.

Arbeiðsbólkurin metir, at føroyskur kappróður og siðbundni føroyski báturin hoyra óloysiliga saman, og at áhugin fyri føroyska bátinum eisini verður mentur gjøgnum kappróðrarítróttina.

Tað hevði tí verið ynskiligt, at Róðrarsamband Føroya í sínum regluverki tók atlit at aðalreglunum í upprunasniðinum á føroyska bátinum.

Tað er alla æru vert, at sjálvbodnar kreftir avrika stór arbeiði og brúka nógva frítíð í kappróðrar- og bátafeløgum. Tað er somuleiðis spennandi at síggja, at tað er frammi í tíðini, at gingið verður saman um at seta á stovn livandi bátasøvn. Viljin er har.

Mælt verður til, at ein játtan verður sett av til stuðul til virksemi hjá frítíðarfeløgum, ið eru um tann siðbundna føroyska bátin. Mælt verður til, at stuðulin verður merktur til tiltøk, ið fremja kunnleikan til føroyska bátin og til bátasmíð. Mælt verður til, at kr. 200.000 verða settar av í 2013.

Tann føroyski báturin er varðveittur, og hann verður brúktur. Tá ið tað kemur til at varðveita føroyskt bátasmíð, verður mett, at tíðin er komin til at lyfta hesa uppgávu upp á eitt hægri støði. Avbjóðingin verður at fáa hesa fornu handbornu vitan í serligar útbúgvingarkarmar.

## 11. Bátasmíð og útbúgving

Í dag er vitanin til føroyskt bátasmíð ikki longur eitt arvað handverk. Kunnleikin fer ikki longur fram millum einstaklingar, og neyðugt verður at síggja loysnina at varðveita bátasmíð við at fara frá óformligari læru, og yvir til eina meira formliga læru.

Leingi hevur tað verið so, at eingin hevur verið í læru hjá bátasmiðum. Teir fáu nýggju bátasmiðirnir, sum eru komnir til seinnu árini, hava av egnum áhuga ognað sær sínar førleikar. Ein annar møguleiki hevur verið at farið uttanlands at nema sær kunnleika til bátasmíð. Eyðsæð er tó, at hóast bátasmíð í grannalondum okkara í ávísan mun byggir á sama grundarlag, so verður vitanin um tað serliga við føroyska bátinum ikki ført víðari á henda hátt.

Vit eru tí komin til, at hetta siðbundna handverk er í vanda fyri at doyggja út í Føroyum. Vinnan hevur ikki megnað at sett nýtt fólk við, og arbeiðsbólkurin hevur tí ta fatan, at vit ikki longur kunnu dúva upp á vinnuna einsamalla, skal bátasmíðið varðveitast sum handverk í landinum.

**Útbúgvingarmøguleikar innan bátasmíð í Føroyum**
Útbúgvingin til bátasmið hevur sum nevnt verið ein óformlig læra uttan regluverk og krøv til innihald í útbúgvingini. Í staðin hevur tað verið upp til hvønn einstakan bátasmið at gera av, hvussu og hvat hann hevur lært frá sær. Tá ið útbúgvingar- og frálæruviðurskiftini eru so óskipað, er tað eingin trygd fyri, at vit í framtíðini megna at varðveita tað siðbundna handverkið.

Tað er vert at minnast til, at føroyski bátasmiðurin, sum vit hava kent hann, ongantíð fekk nakað lærubræv, ið segði, at hann var útlærdur bátasmiður. Sjálvt um hann framvegis hevði nógv eftir at læra, kundi ein kalla seg bátasmið, tá ið ein hevði verið hjá einum eldri bátasmiði og smíðað tólv bátar. Soleiðis hevur verið fram til dagin í dag. Frá almennari síðu verður nú mælt til, at útbúgvingar verða formaliseraðar.

Arbeiðsbólkurin mælir tí til at gera bátasmíð til eina formliga útbúgving við skipaðum viðurskiftum og greiðum ásetingum, soleiðis at útbúgvingin verður skipað, eins og hon er í okkara grannalondum. Við at gera útbúgvingina formliga, ber til eftir lokna lærutíð at fara undir aðra framhaldsútbúgving við støði í útbúgvingini til bátasmið.

Arbeiðsbólkurin hevur harafturat umrøtt møguleikan fyri at skipa frálæru í bátasmíði sum skeiðsvirksemi. Her verður hugsað um, at ein tekniskur skúli í Føroyum skipar fyri afturvendandi skeiðum í bátasmíði, og at hetta verður gjørt í samstarvi við Søvn Landsins. Arbeiðsbólkurin hevur ikki viðgjørt spurningin um innihald í slíkum skeiðum, men skeiðini eiga at byggja á tað siðbundna handverkið, bæði ástøðiliga og handaliga.

Við skeiðsvirksemi fáa luttakararnir ikki førleika sum útbúnir bátasmiðir, men fáa eitt ávíst innlit í bátasmíð. Hetta er eitt gott ískoyti til at vekja áhugan fyri bátasmíði og fyri at spjaða vitanina um bátasmíð, ið eisini kundi verið galdandi fyri onnur siðbundin handverk, so sum siðbundið húsasmíð, jarnsmíð og ullavirking. Skeiðsvirksemi einsamalt tryggjar tó ikki varðveitsluna av bátasmíði sum handverk í Føroyum.

**Bátasmiðútbúgving sum yrkisútbúgving**

Grundað á marknaðarviðurskiftini hava bátasmiðirnir í Føroyum tey síðstu árini ikki havt møguleika fyri at hava lærlingar, og lítið talar fyri, at marknaðurin broytist til tað betra, soleiðis at bátasmiðirnir aftur kunnu hava lærlingar. Tí ber ikki til einans at líta á teir virknu bátasmiðirnar, tá ið talan er um at varðveita bátasmíð sum handverk í Føroyum. Arbeiðsbólkurin mælir tí til, at varðveitslan av bátasmíði sum siðbundið handverk fer fram í savnshøpi, og at Søvn Landsins varðar av hesi uppgávu.

Sigast skal, at Søvn Landsins ikki hevur bátasmíð, og tí ikki hevur sakkøn fólk, men at tað hevur týdning, at handverkið verður stovnfest hjá tí, ið frammanundan umsitur tann materiella mentanararvin. Hetta er eisini í tráð við tilmælini í UNESCO-sáttmálanum um verju av immateriellum mentanararvi.

Bátasmíð í savnshøpi er ikki eitt nýtt fyribrigdi í okkara grannalondum. Eitt nú eru bátasmiðir á søvnunum Vikingeskibsmusseet i Roskilde í Danmark, Oselververkstaden og Hardanger fartøjvernsenter í Noregi og Shetland Museum and Archives í Hetlandi. Á hesum bátasmiðjum eru bæði bátasmiðir í starvi og lærlingar. Tó ikki á Shetland Museum and Archives. Har hava tey ikki havt nakran lærling enn. Ein orsøk til, at livandi bátasmíð er partur av savnsvirkseminum í okkara grannalondum, er, at vandi er fyri, at bátasmíð sum handverk doyr út. Marknaðurin fyri siðbundnum bátum er minkaður niður í nærum einki, og bátasmiðirnir fækka í tali. Fyri at tryggja, at vitanin um siðbundið bátasmíð verður varðveitt, er bátasmíð tí vorðið partur av savnsvirkseminum, og sum lið í at varðveita vitanina um handverkið, hava søvnini eisini lærlingar.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at Søvn Landsins fær til uppgávu at skipa og umsita eina livandi bátasmiðju, har til ber hjá vitjandi at síggja og uppliva føroyska bátin smíðaðan á siðbundnan hátt. Endamálið við bátasmiðjuni skal vera at varðveita siðbundið bátasmíð sum handverk í Føroyum. Bátasmiðjan skal hava køn fólk, ið skulu smíða nýggjar bátar við støði í teimum gomlu handverkssiðunum, sum neyv eftirgerð av eldri bátum, umframt at umvæla bátar, sum eru verdir at varðveita. Føroyskir bátasmiðir skulu saman við lærlingum vera knýttir at bátasavninum.

Bátasmíð, sum yrkisútbúgving, verður fyriskipað sum ein skiftisútbúgving. Skift verður millum verkliga læru á læruplássi, og skúlagongd á góðkendum skúla. Av tí at eingin føroyskur skúli bjóðar útbúgvingina út, verður neyðugt at taka skúlagongdina eitt nú í Danmark ella øðrum landi, har skúli er við hesari skúlagongd. Tað verður ikki mett at vera ein vansi fyri útbúgvingina, at skúlagongdin ikki verður tikin í Føroyum, tí lærlingurin í tí verkliga partinum, sum er helmingurin av útbúgvingartíðini, arbeiðir við føroyskum bátum. Tvørturímóti kann lærlingurin á henda hátt gerast meira fjølkønur í bátasmíði.

Áðrenn ein slík bátasmiðja tekur inn lærling, er neyðugt, at bátasmiðjan fær læruplássgóðkenning. Yrkisnevndin, ið er mannað við limum úr vinnuni, hevur ábyrgdina av at góðkenna bátasmiðjuna sum lærupláss. Hetta verður gjørt við at hyggja eftir arbeiðsuppgávunum, umstøðunum og talinum av bátasmiðum.

Í tilgongdini at skipa livandi bátasmiðju í savnshøpi er neyðugt við tøttum samstarvi við vinnuna, m.a. fyri at forða fyri, at virksemi í savnshøpi verður kappingaravlagandi fyri vinnuna. Hinvegin verður mett, at tað kann vera gagnligt fyri vinnuna, um eitt livandi bátasavn verður sett á stovn, tí hetta kann vera við til at seta størri fokus á tann føroyska bátin og harvið skapa størri kunnleika til bátin, bæði millum føroyingar og útlendsk ferðafólk. Hetta kann økja um eftirspurningin eftir føroyska bátinum, og á tann hátt gera tað meira liviligt hjá føroyskum bátasmiðum.

**Mettur kostnaður fyri eina bátasmiðju**
Sum vit hava sæð tað í søguligari tíð, vóru serlig yrkisumhvørvi í landinum, har bátasmíð hevði sterkar traditiónir. Tað snýr seg um at endurskapa eitt slíkt yrkisumhvørvi aftur, og harvið styrkja hetta serstaka handverk til tørvin í nútíðarsamfelagnum.

Í útgangsstøðinum kann ein smiðja verða staðsett nærum hvar sum helst.

Verður bátasmiðjan skipað á savni, mugu umstøðurnar til vitjandi, ferðafólk og skúlaflokkar vera nøktandi. Hetta setur munandi størri krøv til eitt nú fermetratal, og tað setur eisini krøv til móttøku og tænastur til tey vitjandi, eitt nú w.c., kunning og søla av lutum og øðrum. Tað er tí umráðandi, at ein bátasmiðja, ið er ætlað vitjandi, verður løgd í tilknýti til virksemi, ið longu hevur hesar tænastur at bjóða.

Roknast kann við útreiðslum til trygdartiltøk á smiðjuni, til eitt nú útsúgving, vernd og annað sambært reglum hjá Arbeiðseftirlitinum á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Torført er tó at siga, hvat kostnaðurin verður at seta hesi tiltøk í verk. Tá ið ein liðug projektering er gjørd, og ein lýsing av arbeiðsgongdini verður løgd við, ber betur til at siga kostnaðin av hesum tiltøkum, nevnd omanfyri. Tað er eisini ilt at meta um ein kostnað fyri eina bátasmiðju, men roknað verður við, at ein smiðja við umstøðum at taka í móti ferðafólki og skúlaflokkum í minsta lagi skal vera 70m², og at fermetra kostnaðurin er kr. 25.000.

Verður roknað við vanligum hondamboðum og el-tólum til eina bátasmiðju, verður mett, at byrjanarkostnaðurin er umleið kr. 200.000. Verður roknað við eini betri útgjørdari smiðju við bandsag, høvlum, taljum v.m. er kostnaðurin hartil hægri.

**Mettur rakstrarkostnaður**
Verður bátasmiðja formliga skipað á einum savni, við sveini og lærlingi, eru mettu rakstrarútreiðslurnar hesar:

| | |
|---|---|
| Savnvørður og skrivstova, árliga | kr. 250.000 |
| Sveinaløn árlig | kr. 350.000 |
| Lærlingaløn árlig | kr. 200.000 |
| Aðrar útreiðslur | kr. 50.000 |
| **Mettur rakstrarkostnaður í alt árliga** | **kr. 850.000** |

Í metingini er roknað við savnvørði ¼ tíð at standa fyri arbeiðinum, so sum fakliga skjalfesting, innsavnan, miðlan og gransking og skrivstovufólki ¼ tíð at standa fyri bókhaldi og umsiting annars.

Tað er ivasamt, hvussu nógvar inntøkur fara at standast av eini bátasmiðju á einum savni. Teir bátar, ið verða smíðaðir, kunnu verða seldir, um nakar marknaður er, men tá má hædd takast fyri, at hetta ikki er kappingaravlagandi.

**Útbúgving í samstarvi við onnur Norðurlond**
Í 2007 tók Norðurlandaráðið avgerð um at kanna støðuna hjá siðbundnu handverkunum í Norðurlondum. Orsøkin var, at smá og siðbundin handverk hava trupul kor í Norðurlondum, tí ov fáir handverkarar eru innan hvørt øki. Tað er tí trupult at varðveita útbúgvingartilboð innan hesi handverk. Nevnt verður í grundgevingini, at siðbundin handverk hava týdning bæði fyri tann materiella og tann immateriella mentanararvin. Meðan materielli mentanararvurin er knýttur at lutum og vørum, so verður immaterielli mentanararvurin borin av fólki og virki.  Ført verður eisini fram, at týdningurin av immateriella mentanararvinum varð staðfestur, tá UNESCO í 2003 samtykti sáttmálan um verju av immaterilla mentanararvinum. Tað verður tí mett av týdningi, at Norðurlond samstarva um at tryggja handverkinum livilíkindi.

Sum avleiðing av avgerðini hjá Norðurlandaráðnum verður nú í norðurlendskum høpi arbeitt við eini verkætlan, sum hevur til endamáls at varðveita siðbundin handverk. Sum dømi hevur verið arbeitt við varðveiting av bátasmíði í Norðurlondum. Fyribils niðurstøðan í hesi verkætlan er, at handverkini, harímillum bátasmíð, í dag eru so smá og hótt, at tað er ein fyrimunur at síggja varðveitsluna av siðbundnum handverkum í einum felags norðurlendskum høpi, tó at atlit mugu takast at ymiskleika landanna millum. Verkætlanin leggur upp til samstarv millum Norðurlond um útbúgving av bátasmiðum, t.e. samstarv um verkliga upplæring á einum læruplássi og samstarv um skúlagongd.

**Samanumtøka**
Tað er av týdningi, at útbúgvingin til bátasmíð verður formaliserað soleiðis, at lærlingar fáa prógv eftir lokna útbúgving. Hetta hevur týdning fyri at tryggja góðsku, og fyri at tryggja møguleikan at fara víðari í útbúgvingarskipanini.

Yrkisdepilin hevur higartil partvís tikið lut í norðurlendsku verkætlanini at varðveita siðbundin handverk, og arbeiðsbólkurin mælir til, at Føroyar taka lut í einum møguligum norðurlendskum samstarvi innan økið.

Arbeiðsbólkurin mælir til
- at skipa bátasmíðútbúgvingina sum eina yrkisútbúgving við skipaðum viðurskiftum og innihaldi, fyri á tann hátt at tryggja varðveitsluna av bátasmíði sum handverk í Føroyum, og fyri at geva útlærdu bátasmiðunum størri og betri møguleikar eftir lokna útbúgving
- at Yrkisdepilin, tekniskur skúli og Søvn Landsins greina í felag innihaldið í útbúgvingini og meta um lærupláss
- at tekniskur skúli í samstarvi við Søvn Landsins skipar fyri skeiðstilboðum fyri áhugaðum í bátasmíði
- at  Føroyar taka lut í einum møguligum norðurlendskum samstarvi um siðbundin handverk

Mælt verður til, at Yrkisdepilin í samstarvi við viðkomandi partar arbeiðir víðari við grundarlagnum fyri, at hesi tiltøk kunnu verða sett í verk.

## 12. Vinnu- og búskaparlig áhugamál

Tað er áður staðfest, at marknaðurin fyri føroyska bátinum er lítil. Vit síggja í dag, at teir bátasmiðir, sum enn eru virknir, hava minni og minni at gera. Hetta hevur eisini havt við sær, at fleiri av teimum virknu bátasmiðunum í dag bert arbeiða sum bátasmiðir ein part av tíðini, tí teir hava fingið sær annað arbeiði við síðuna av.

Vinnuliga virksemið, ið lá til grund fyri bátasmíðinum frá umleið 1945-1970, tvs. utróður her heima og serliga í Grønlandi, er ikki til í dag.

Tá ið tað kemur til at siga, hvør ið er bátasmiður í dag, so er tað ikki lætt at koma við einum greiðum svari. Teir eru sum nevnt fáir, ið hava tað sum sítt høvuðsyrki, og sum hava tað sum vinnuveg, men tað eru fleiri, ið duga at smíða bát, og teir eru fleiri, sum hava tað sum ítriv.

**Framleiðslukostnaður**
Tað hevur verið ført fram, at báturin verður ov kostnaðarmikil at keypa, tá meirvirðisgjald skal leggjast afturat søluprísinum, og at hetta er ein av orsøkunum til, at eftirspurningurin er so lítil.

Niðanfyri er ein meting, ið sýnir kostnaðin av at smíða ein føroyskan bát.

**Dømi**
4-mannafar: Kostnaður í alt 50.000 kr. uttan MVG
6-mannafar: Kostnaður í alt 65.000 kr. uttan MVG
8-mannafar: Kostnaður í alt 75.000 kr. uttan MVG

**Útgreinað fyri kostnaðin á 4-mannafari**
Viður:
Eik til kjølin kr. 3.500
Grann kr. 6.500 ella fura kr. 9.500

Seymir:
500 stk. 1 ½” á 2 kr. stk. Íalt kr. 1.000
200 stk. 4” á 4 kr. stk. Íalt kr. 800

Arbeiðstíð:
150 tímar sjóklárur (4 árar, mastur, róður, kassi til páhangsmotor, stýri)

Løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald er ein avgjaldslóg, sum áleggur meirvirðisgjald á vinnuliga sølu av vørum og tænastum. Tó ásetur § 2 stk. 3, d), at mentanarligt virksemi, harímillum bókasøvn og forngripasøvn, o.t. er undantikið avgjaldsskylduni.

Tað er Fíggjarmálaráðið, ið umsitur løgtingslóg um meirvirðisgjald, og upp á fyrispurning í løgtinginum í 2009, hvørt bátasmíð kann koma undir mentanarligt virksemið og harvið verða frítikið fyri meirvirðisgjald eftir lógini um meirvirðisgjald, svarar táverandi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jóannes Eidesgaard, soleiðis:

> *"Lat meg byrja við at siga, at Fíggjarmálaráðið fær næstan dagliga fyrispurningar, umsóknir og uppskot um frítøkur og undantøk í mvg-lógini. Grundgevingarnar eru altíð góðar, men hevði bert ein brotpartur av hesum uppskotum verið fylgd, so hevði ikki verið nógv eftir av mvg-lógini í dag.*
>
> *Mvg-lógin er ein avgjaldslóg, sum áleggur mvg á vinnuliga sølu av vørum og tænastum. At byggja og selja føroyskar bátar er vinnuligt virksemi sambært mvg-lógini. Hetta kemur tí ikki undir mentanarligt virksemi eftir lógini um meirvirðisgjald.*
>
> *At smíða føroyskar bátar hevur sjálvandi stóran týdning fyri at føra okkara mentanararv víðari. Er politiskt ynski um at stuðla føroyskum bátasmíði fíggjarliga, so skal tað gerast við beinleiðis stuðli á fíggjarlógini og ikki óbeinleiðis umvegis mvg-lógina."*

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt spurningin um avtøku av meirvirðisgjaldi og ella beinleiðis stuðli á fíggjarlógini, men mett verður ikki, at hetta fer at ávirka eftirspurningin í nóg stóran mun.

Við fallandi eftirspurninginum í huga eigur í staðin at verða hugt eftir, hvussu bátasmíð kann innganga í sonevnda upplivingarbúskapin. Í siðbundna búskapinum er tað báturin, ið er tann vøran, ið bátasmiðir framleiða. Í upplivingarbúskapinum er tað upplivingin sjálv, tað at síggja ein bát verða smíðaðan og at brúka og uppliva bátin, ið er vøran, ið verður eftirspurd.

**Samanumtøka**
Í staðin fyri at stuðul verður latin til sølu av føroyska bátinum, eitt nú við MVG arfturbering, verður mælt til, at karmar verða skaptir, soleiðis at tað virðið, ið liggur í føroyskum bátasmíði, kann verða gagnnýtt í føroyska upplivingarbúskapinum, eitt nú innan ferðavinnuna. Hetta kann eitt nú verða gjørt við at stuðla tiltøkum, ið fremja brúkið av føroyska bátinum og við stuðli til livandi søvn, sum nevnt omanfyri.

Mælt verður til, at tiltøk, ið knýta seg til brúkið av bátinum og upplivingina av bátasmíði, verða stuðlað, við at stuðul verður veittur til livandi søvn, og til virksemi hjá bátafeløgum.

**Ferðavinnuáhugamál**
Føroyska ferðavinnan hevur skipað seg í Ferðavinnufelagið, sum hevur sum sítt fremsta endamál at savna allar ferðavinnufyritøkur at ganga saman um felags áhugamál, so at ferðavinnan skal gerast ein týðandi táttur í føroyska búskapinum. Limirnir í Ferðavinnufelagnum eru stórar og smáar fyritøkur, uml. 30 í tali.

Ferðavinnufelagið hevur viðgjørt spurningin um bátasmiðju og møguliga stovnan av einum livandi savni. Felagið metir, at føroyski báturin og bátasmíð avgjørt kann fáa týdning fyri føroyska ferðavinnu, og at tað ber til at marknaðarføra bæði bát og bátasmíð.

**Bátasmíð kann gerast lokkandi**
Ferðavinnan staðfestir, at primeri málbólkurin, ið kemur til Føroyar, eru danir, men harafturat koma eisini nógvir gestir úr øðrum londum í Europa, har eru týski, franski og hollendski marknaðurin størstir hjá Smyril Line, meðan Atlantic Airways eisini flytir nógv bretsk ferðafólk til Føroyar. Við Smyril Line eru tað eisini nógv ferðafólk, ið steðga í Føroyum annaðhvørt á veg til ella úr Íslandi. Ferðafólk, ið koma til Føroyar, steðga aloftast í 1 viku, men vikuskiftisferðir eru eisini væl dámdar. Í høvuðsheitum er aldurin á ferðafólki yvir 50 ár og talan er um fólk, ið hava áhuga í náttúru og mentan. Hetta er málbólkurin hjá ferðavinnuni – sonevndir "kulturturistar".

Verður steðgurin hjá teimum ferðandi stuttur, fara tey til Kirkjubøar, í gomlu Havnina og eitt nú til Gjáar at venda. Verður steðgurin í landinum nakrar dagar, seta ferðavinnufyritøkur saman pakkar. Tað kann vera ein dagstúrur í Sandoynna, har tey fara útferð við báti, og inn í eitt vanligt heim at fáa ein bita. Tað kann vera ein túrur í Eysturoynna at síggja ein stóran føroyskan urtagarð á Glyvrum, ella ein longri túr til Trøllanes at síggja jarnsmíð á éconmusée-savninum 'Mikkjals Smiðju'.

Fyritøkan GreenGate Incoming leggur seg eftir at seta saman tilboð til ferðandi. Tað eru tær "autentisku" upplivingarnar, ið fyritøkan metir loysir seg: tað, sum er føroyskt ella serføroyskt.

**Marknaðarføring**
Størstu aktørarnir, t.e. Atlantic Airways og Smyril Line, hava størsta fokus á Danmark og síðan koma, sum nevnt omanfyri, teir smærru marknaðirnir. Verður Smyril Line, sum er millum størstu limafeløg í Ferðavinnufelagnum, brúkt sum dømi, verður nógv gjørt á europiska marknaðinum fyri at marknaðarføra Føroyar. Eitt nú sendir fyritøkan á hvørjum ári katalog í 150.000 eintøkum út í Europa og røkir harumframt eisini heimasíður á týskum, donskum og enskum máli. Uml. 10.000 vitja hesar síður hvønn dag.

Tá ið tað kemur til at marknaðarføra eina bátasmiðju krevst, at ferðavinnan kennir prís, upplatingartíðir, heildarupplivingina o.a. Tað hevur stóran týdning hjá ferðavinnuni at vita alt um hetta "produkt" í góðari tíð, og í minsta lagi eitt ár frammanundan. Somuleiðis skal ein slík bátasmiðja, har ferðandi koma á gátt at uppliva eitt livandi handverk, liva upp til tað, sum hon lovar vinnuni.

Ferðavinna leggur dent á, at prísirnir skulu vera sámuligir fyri at fáa sum flest vitjandi. Ferðavinnan leggur áherðslu á, at inntøkurnar, ið kunnu koma frá vitjandi á einari bátasmiðju, ikki koma alt fyri eitt, men mugu byggjast upp yvir eitt ávíst tíðarskeið.

**Staðfesting ferðavinnurnar**
Upplivingar, ið kunnu koma av at vísa fram føroyskt bátasmíð, koma sum sagt ikki dag frá degi. Ferðavinnan, sum sær møguleikar í at fáa nýggjar inntøkur frá ferðafólki, ið vitja eina bátasmiðju, leggur dent á, at hetta ferðatilboð verður lagt til rættis í góðari tíð.

Ferðavinnan metir eisini, at ferðafólk saktans kunnu vitja fleiri bátasmiðir. Tað er eingin forðing at hava fleiri bátasmiðjur í at velja, tvørturímóti.

Ferðavinnan staðfestir, at á eini bátasmiðju er neyðugt at hjúkla um tey vitjandi. Eitt sonevnt 'visitor centre' má vera á bátasmiðjuni, har miðla- og kunningartilfar er tøkt, ein savnsbúð, har tinganest o.a. fæst til keyps, og har til ber at fáa sær ein drekkamunn. Føroyska ferðavinnan sigur seg ynskja lættar loysnir, sum eitt nú í Hetlandi, har sjálvt smærri støð á bygd og útoyggj hava visitor centers.

At enda staðfestir ferðavinnan eisini, at skal ein bátasmiðja sýnast fram fyri ferðafólki, og skal hon kasta vinning av sær, so eigur smiðjan at staðsetast, har flest ferðafólk koma og fara.

**Samanumtøka**
Ferðavinnan kann verða við til at menna nýggjar vinnumøguleikar fyri siðbundna handverkið. Mælt verður til, at samstarv verður skipað millum ferðavinnuna og umboð fyri bátasmiðir og bátaumhvørvi annars, so at ferðavinnan kann marknaðarføra føroyskt siðbundið handverk, og at nýggir marknaðir harvið kunnu verða mentir.



*Amboð og útgerð hjá Niclas í Koltri. Frá skrásetingini á Føroya Fornminnissavni 2010*
*Mynd: Føroya Fornminnissavn*

## 13. Tilmæli

Í álitinum hevur bátasmíð verið viðgjørt við støði í musealum áhugamálum, ítróttar- og frítíðaráhugamálum, útbúgvingarligum áhugamálum og fíggjarligum áhugamálum. Felags fyri hesi áhugamál er, at onki av hesum einsamalt kann tryggja, at bátasmíð verður varðveitt í Føroyum.

Ásannandi, at marknaðurin fyri føroyska bátinum er lítil, er tíðin komin at umhugsa bátasmíð og bátasmíðsyrkið í nýggjum høpi. Í álitinum verður ført fram, at í grannalondum okkara eru fleiri dømi um livandi søvn við siðbundnum bátasmíði. Arbeiðsbólkurin metir, at tá vinnan ikki megnar at seta nýggjar kreftir við, so er tíðin við at vera búgvin til, at hond verður tikin um siðbundna handverkið í savnshøpi.

Fyri at skapa góðar karmar um verjuna av siðbundnum handverki verður mælt til, at tikið verður undir við UNESCO-sáttmálanum um verju av immateriellum mentanararvi, og at viðkomandi føroysk lóggáva verður dagførd samsvarandi. Eisini verður mælt til, at føroysk savnslóggáva verður dagførd, so hon kann fevna um skipan av og stuðul til livandi søvn.

Dagføring av føroysku savnslóggávuni eigur at verða raðfest, og miðað eigur at verða ímóti, at UNESCO-sáttmálin fyri verju av immateriella mentanararvinum verður settur í gildi í 2013.

Stovnsetan av bátasmiðju í savnshøpi innan ásetingarnar í føroyskari lóggávu, letur upp fyri, at bátasmíð sum livandi handverk verður varðveitt, samstundis sum bátasmiðir kunnu fáa ein vinnuveg við at sýna fram siðbundið bátasmíð.

Verður bátasmiðja skipað sum livandi savn, verður mælt til, at samstarv samstundis verður skipað millum skúla og savn um, at skúlaflokkar koma á vitjan at fáa kunnleika til handverkið og bátin, og at skipað verður fyri gerð av hóskandi undirvísingartilfari í hesum sambandi.

Livandi handverkið verður varðveitt gjøgnum handborna vitan, og tí er neyðugt, at lærlingar verða settir við, skal føroyskt bátasmíð varðveitast sum handborin vitan. Nær hetta skal gerast, er í fyrstu syftu ein spurningur um fígging, og um áhugi er fyri slíkum læruplássi. Í løtuni eru heilt fáir virknir bátasmiðir, og tá hesir gevast, hvørvur handborna vitanin. Uttan at lærlingur verður settur við, er skotbráið umleið 20 ár, til handborna vitanin um føroyskt bátasmíð er burtur. Dagførdir lóggávukarmar fyri savnsøkið kunnu tryggja, at føroyskt bátasmíð sum handverk verður varðveitt.

Miðað eigur tí at verða ímóti, at støða verður tikin til yrkisútbúgving og lærupláss, tá UNESCO-sáttmálin fyri verju av immateriella mentanararvinum er settur í gildi.

Mælt verður til, at skeiðstilboð í bátasmíði verða fyriskipað á tekniskum skúla í samstarvi við Søvn Landsins, og at hesi skeið verða boðin út eftir tørvi. Mælt verður til, at fyrsta skeiðið í bátasmíði verður boðið út í 2014, og at kr. 100.000 verða settar av til endamálið.

Arbeiðsbólkurin er greiður yvir, at tá bátasmíð verður flutt frá at vera vinnuligt virksemi til í høvuðsheitum at vera savnsvirksemi, so fer hetta at ávirka inntøkugrundarlagið hjá teimum bátasmiðum, ið enn virka á vinnuligum grundarlagi. Ein livandi bátasmiðja í savnshøpi fer tó eisini at skapa lønandi virksemi hjá teimum bátasmiðum, ið eru knýttir at eini bátasmiðju á einum savni.

Mælt verður til, at frítíðarfeløg, ið eru um tann siðbunda føroyska bátin, verða stuðlað á fíggjarlógini. Mælt verður til, at kr. 200.000 verða settar av til endamálið í 2013.

Mælt verður til at heita á Róðrarsamband Føroya, um at atlit í mest møguligan mun verða tikin at aðalreglunum í upprunasniðinum á føroyska bátinum í regluverki teirra.

Mælt verður til, at ferðavinnan og verandi bátasmiðir taka upp samband um møguligt samstarv, og at ferðavinnan verður tikin við upp á ráð, tá ein bátasmiðja verður skipað sum livandi savn.

**Samanumtikið**
Samanumtikið verður mælt til, at

- arbeitt verður fram ímóti, at UNESCO-sáttmálin til verju av immateriella mentanararvinum verður settur í gildi fyri Føroyar, og at føroysk lóggáva á viðkomandi økjum verður dagførd samsvarandi

- karmar verða skaptir fyri skipan av livandi søvnum innan føroyska savnslóggávu. Stuðulslóggávurnar til savnsvirksemið eiga í hesum viðfangi at verða dagførdar

- Róðrarsamband Føroya, sum er kveikjari, tá tað kemur til at skapa áhuga fyri føroyska bátinum, tekur atlit at aðalreglunum í upprunasniðinum á føroyska bátinum í sínum regluverki

- játtan verður sett av á fíggjarlógini sum stuðul til virksemi hjá frítíðarfeløgum, ið eru um tann siðbundna føroyska bátin

- arbeitt verður fram ímóti, at útbúgving í siðbundnum bátasmíði verður skipað sum yrkisútbúgving

- skeiðstilboð í bátasmíði verða fyriskipað á tekniskum skúla í samstarvi við Søvn Landsins

- samstarv verður skipað millum skúla og søvn um livandi savnsvirksemi

- samstarv verður skipað millum ferðavinnu og bátasmíð



*Kappsigling á Skálafjørðinum Mynd: Regin Debess*

MENTAMÁLARÁÐIÐ